Ein av sögunum um Jólalítla



Ein av søgunum um Jóla lítla

Hava tit nakrantíð sæð eim so lítlan drong? So kenna tit ikki Jóla. Jú, eg kendi hann væl. Hann var so lítil, tí hann var ein vættur — smátt fólk, sum býr inni undir onkustaðni, har fólk og kettur ikki koma at.

Ógvuliga fittur er Jóli. Vit plagdu at spæla saman fyrr, tá eg var lítil. Men eg var ikki so lítil sum Jóli. Eg var so nógv størri. Bara við hvørt, tá vit báðir spældu einsamallir, ynskti eg so staðiliga at vera líka lítil og kringur sum hann. Hann vigaði einki heldur.

Ja, hann var so lítil og lættur, at tá eg sigldi í ánni, í Dunnuhylinum, við einari fjøl, sum var mítt skip, so kundi Jóli sum einki vera umborð. Koppaði skipið, tí eg hevði lagt ov nógvar steinar á tað — ella tí at eg gjørdi ov stórar aldur, so klaraði Jóli seg altíð upp á aftur skipið.

Hann kundi eisini vera í skúlataskuni. Men mest vóru vit saman um kvøldið, tá eg var farin í song. So kom hann undan seingini, toygdi seg upp til mín, og so lyfti eg hann upp á dýnuna. Við hvørt kleiv hann sjálvur upp eftir seingjarstólpunum, tí fimur og kvikur var hann.

Jóli, ja hann kundi! Tað veit eg fleiri søgur um.

Og einki ræddist hann — uttan kettur og vaksin fólk. Kanska meira fólkini enn ketturnar.

Onkuntíð, tá eg sá hann sita burturi í øðrum tonkum, so plagdi eg at siga »mjauv« —, og so sprakk hann inn undir onkustaðni og krógvaði seg. Skjótari enn eitt síl var hann. Men vit vóru vinmenn, so eg mátti lova ikki at kløkka og ræða hann soleiðis. So eg gjørdi tað bert eina ferð.

Tá eg var úti og skreiddi vetrarkvøldini á skíðifjølini, sum eg sjálvur hevði gjørt mær av 4 tunnufjølum og einum oka framman og einum aftan við bandi í, so kom Jóli har við sínari skíðifjøl. Og hon var uppaftur betri enn mín, bara so nógv minni. Tað var ein øðuskel. Eg skal siga tær, hon var so hál, tá hetta døkka var slitið uttanav, at tað var ikki til at fáa eyga á hann, tá hann fór pílandi avstað oman gjøgnum brekkuna á Skriðheyggi. Svávulpinn hevði hann at stýra við.

Einaferð kom hann av óvart at renna á gomlu Katrinu, sum kom malandi framvið, meðan vit skreiddu. Hon rópti og gav seg illa, at hon hevði fingið heksaskot. »Nei, tygum, hatta var ein jólastingur,« segði eg. Tá gjørdist hon grumm, snýsti við og segði bara: »Óforskammað!«

Jóli og hansara fólk hildu eisini jól, sum vit gjørdu fyrr. Og tey plagdu at hjálpa skyldmanninum, jólamanninum, sum tú helst hevur hoyrt um.

Jú, Jóli, jólapápin og systkini sluppu øll at hjálpa til við at gera jólagávur og við at pakka jólagávur. Jólamamman hevði so nógv annað um at vera. Hon hugsaði um matin og klæðini, tí tað var tað eingin annar av hinum, sum dugdi; og maturin hjá henni smakkaði so nógv best, plagdi Jóli at siga.

Tá í tíðini var tað so, at jólamaðurin fór í hvørt hús, har børn vóru jólaaftan, tá øll vóru løgst, og eingin sá hann. Hann hevði stóran posa við sær við gávum. Eg veit líka, nú hava jólamenninir kanska lagt tað av, tí tað eru so nógv fleiri hús og nógv fleiri børn enn tá, og øll fáa so nógvar gávur kortini. Jú, man tað ikki vera? Tey munnu vera fá nú á døgum, sum einki fáa til jóla her um okkara leiðir. Nú fáa vit at síggja, hvussu verður á jólum í ár.

Sum sagt, Jóli plagdi at hjálpa jólamanninum; og so einaferð spyr Jóli, um hann ikki kann sleppa við honum jólaaftan.

»Nei, tað fer ikki at bera til, vælsignaður,« segði jólamaðurin. »Tú orkar ikki at fylgjast við mær.«

»Eg kundi sitið uppi á posanum,« treiskar Jóli.

Og sanniliga, jólamaðurin segði, sum mamma plagar at siga, tá vit júka: »Āja, meðni.«

Og so setti Jóli seg væl til rættis, ovast á rokanum ímillum teir nógvu hørðu pakkarnar og teir nógvu bleytu pakkarnar. Har var gott at sita og ikki so ógvuliga kalt. Hann var vanur við kulda, og

reyðhúgvuna hevði hann smoygt væl niður um oyruni.

So koma teir inn í fyrsta húsið. Bølamyrkt er inni. Øll eru løgst. Teir ganga grúiliga spakuliga, so eingin skal varnast teir.

»Atsj!« nýsur Jóli, tá teir eru komnir í forstovuna. Men til alla lukku hoyrdi eingin. Tað vil siga, jólamaðurin hoyrdi tað sjálvandi, og hann gjørdist so kløkkur, at hann mundi gliðið og mist posan. Hann hevði kava undir iljunum, og ikki hevði hann havt stundir at lata seg úr skónum.

Har var ein smágenta í tí húsinum, og tað var skjótt, teir jólamaðurin og Jóli høvdu lagt henni nakrar pakkar niður við seingina. Ja, hon hevði helst gloymt at heingja sokkin! Var sovnað við sokkinum í hondini, og sokkurin var so dottin aftur um seingina.

So fara teir í næsta hús. Men í myrkrinum mistaka teir seg. Fyrst, teir gloppa hurðina, hoyra teir eitt: »m-u-u-u-!« Nú er tað fjósið, teir eru komnir í, og kúgvin, sum so svøvntung helt, at tað var onkur, sum kom at mjólka ella at geva sær hoyggj og kláa henni ímillum hornini.

Nú teir skulu út aftur úr fjósinum, ber posin hjá jólamanninum við vaglið, og har sat hønan.

»O-gogg-gogg-gogg-gogg,« kákaði hon og deildi og leyp so upp á posan í berum býttisskapi, og har

mundi hon forkomið Jóla, neyðardýrinum. Men hann kitlaði hana í beinið, og so sprakk hon niður av aftur við nógvum káki og gangi.

Endiliga koma teir út úr fjósinum og inn í rætta húsið. Allastaðni er kvirt, og teir koma sær so stillisliga inn í eitt kamar, har ein smádrongur liggur í søtasta svøvni. Nú jólamaðurin skal seta tunga posan frá sær, dettur Jóli niður av kollinum og á dýnuna hjá dreinginum. Hóast Jóli var so lættur, at tað næstan ikki merktist, so vaknaði drongurin við.

Tá var jólamaðurin kvikur út. Eg minnist ikki, um hann fekk lagt nakrar gávur eftir seg, ella kanska legði hann onkran pakka eftir úti í forstovuni.

Har lá so Jóli oman á dýnuni, pinnastillur og við bankandi hjarta.

»Eg havi ikki verið so illa staddur í lívinum,« segði hann. »Uttan kanska hina ferðina, tá ein frensur kom eftir mær.«

— Men tað er eisini ein onnur søga.

Til alla lukku var, sum sagt, myrkt, og drongurin sá og hoyrdi einki. Hann helt seg bara hava droymt, at hann hevði hoyrt okkurt. Hann hevði eisini droymt so nógv um jól, um jólagávur og jólamannin. Hann hevði ikki hugsað um annað, áðrenn hann sovnaði. Nú vendi hann sær á hina liðina, og

skjótt svav hann aftur trygt og droymdi sín jóladreym.

So fór Jóli so smátt at ota seg út á dýnutromina. Haðani læt hann seg glíða niður á gólvið. Hann var so lættur, vigaði minni enn ein vøttur, so har hoyrdist einki.

Og so rann hann út.

Jólamaðurin hevði sett opið eftir sær og stóð í forstovuni og bíðaði eftir honum.

»Slíkt hevur ongantíð verið mær fyri fyrr,« teskaði hann sinnisrørdur. »Eg havi nú verið jólamaður í so mong ár; tí var tað eisini býtt av mær at hava teg við. Men nú haldi eg, at tú skalt bara fara til hús aftur. Eg tori ikki at hava teg við meira.«

Hann var ikki illur, bert harmur um, at so illa hevði gingist, og at tað hevði verið um reppið, at nakar hevði sæð hann. Jólamaðurin helt tað vera stóra skomm at verða sæddur av fólki, ið hvussu er inni.

»Far nú, vælsignaður, og ansa væl eftir tær. Tú skilir, eg fái ikki fylgt tær áleiðis,« segði jólamaðurin, stappaði sær skeggið niður í buksurnar, tí kalt var, fekk sær posan á bakið og fór.

Har stóð Jóli lítli eftir einsamallur í myrkrinum, keddur av, at henda spennandi ferðin hevði fingið so bráðan enda. Hann kundi heldur ikki gera við tað, at hann var dottin av posanum.

Hann var ikki bangin fyri at villast og ikki finna til hús. Sum allar vættrar hevði hann hendinga góð evni at finna veg. Ja, mær er sagt, at vættrar finna betur enn hundar, og tað veitst tú, at hundur finnur altíð aftur til hús — um hann vil.

Jóli legði avstað, gleivaði og rann við sínum stuttu beinum, og mangan var ringt hjá honum. Hvør lítil renna var sum ein stór á fyri honum at fara um. Men hann var — sum sagt — óvanliga kvikur og klókur. Aldri ráðaleysur. Ein segl-garnsstubba hevði hann altíð uppi á sær, og so plagdi hann at tveita segl-garnið yvirum, við bukt á, og fáa fast í okkurt hinumegin, ein stein, eitt træsprek ella líknandi, og so lesti hann seg sum einki yvirum.

Langt var til hús hjá Jóla. Kavi var eisini og nakað av vindi. Einaferð kom ein hvirla. — »Hússj!« segði hvirlan og snurraði hann upp í luftina fram við nøkrum fólkum. Men tey hildu tað bert vera eitt pappírs-petti, sum feyk við vindinum. Og so datt hann eftir høvdinum í eina kavafonn. Við strev og baks slapp hann upp aftur.

Men nú kom nýggjur dagur. Sjálvur jóladagur. Meðan ljóst var, mátti hann ikki ganga ímillum húsini, og hann var eisini so lúgvaður og illa svøvntur nú. Tá var hann so heppin at finna ein vøtt, sum okkurt barn hevði mist, og hann kreyp sær inn í vøttin og sovnaði alt í einum.

Í skýmingini vaknaði hann og so aftur til gongu. Enn var langt eftir.

»Mæ-æ-æ« — hoyrdi hann nú eitt siga tætt við. Tað var ein ær, sum hann kendi, og sum hann visti plagdi at ganga framvið hjá teimum hvørt kvøld. Hann rann til hennara og krøkti seg upp undir hana. Har var fjálgt at sita uppi í tí síðu ullini og verða borin avstað — beint fyri dyrnar hjá teimum; har slepti hann og takkaði fyri seg.

Tú kanst ætla, at tað var nokk so seint á kvøldi, hann kom til hús, og øll vórðu sjálvsagt glað at síggja hann aftur. Nógv hevði hann at siga frá, tí eingin vættur hevði fyrr verið við jólamanni og eingin hevur tað heldur síðani, tað eg veit. Hann segði, at tað var tí, hann fekk navnið Jóli. Eg gloymdi at spyrja hann, hvat hann æt fyrr. Kanska hevði hann einki navn frammanundan?

Nú er langt síðani, vit sóust, Jóli og eg, tí, sum eg segði í áðni: hann ræðist kettur og vaksin fólk. Ella er tað bara tað, at eg ikki kann síggja hann meira, tí eg eri vaksin? Helst er tað so. Eg havi ongan vaksnan hoyrt sagt frá, at tey hava sæð vættrar — ikki í álvara. Men eg hugsi, at summi børn kunnu síggja vættrar og tílíkt smáfólk, men hugsa bara ikki um tað sum nakað serliga merkiligt.

Men tað sigi eg tykkum, at síggja tit Jóla, henda fitta, lítla vinmannin hjá mær, so heilsið

honum frá mær og sigið við hann, at eg havi onga kettu í húsinum, og at hann skal fáa ost frá mær á jólum. Honum dámdi væl ost fyrr. Og sukurınolar!

Ikki skuldi tað undrað meg, um hann gekk og mól uttanfyri her í kvøld, soleiðis sum hann var vanur. Jú, Jóli lítli er ein løgin stavnur, sum eg hopi, tit tíma at spæla við, um tit hitta hann. Betri spælibróðir finst ikki. Tað gav at bíta, ta ferðina ... nei, nú skal eg goyma ta søguna til eina aðra ferð.

Sverri Egholm